

## Claus á veg heimaftur

Nógv bendir á, at Claus Bech Jørgensen, sum eitt skifti spældi á føroyska fótbóltslandsliðnum, kundi verið á veg heimaftur til danskan fótbólt. Í farnu viku var hann til royndarvenjing hjá gamla felag sínum, AC Horsens, og har lata tey væl at tí, tey sóu. – Claus vísti arbeiðssemi á venjingarvøllinum, og vit fingu sjón fyri søgn, at hann bæði er royndur og væl fyri. Men sum markanaðurin er í løtuni, standa okkum fleiri spælarar í boði, og vit kanna fleiri møguleikar. Tað er tó eingin ivi um, at Claus er ein møguleiki, vit umhugsa, sigur venjarin hjá AC Horsens, Johnny Mølby. Claus Bech Jørgensen er fyribils farin aftur til Onglands.

# Tróndur heldur framvegis frí

**Tað hevur ljóðað, at 30 ára gamli Tróndur Vatnhamar skal verja málið hjá NSÍ, men fyribils stendur avgerðin um at halda steðg frá fótbóltinum við**




Jákup Mørk

Avgerðin hjá Meinhardt Joensen um at fara til B36 ber við sær, at NSÍ í løtuni stendur uttan nakað upplagt val millum stólparnar. Og tað er sjálvandi eitt hol, sum leiðslan í felagnum vil tippa.

Í vikuni hoyrdist, at felagið vildi hava Tróndur Vatnhamar at verja málið, men hetta er ein spurningur, sum spælarin sjálvur ikki hevur hug at gera stórvegis viðmerkingar til.

– Eg steðgaði í summarsteðginum í fjør, tí hugurin til fótbóltin var ikki longur so stórur, sum hann skal vera fyri at spæla í fremstu deildini. Tann støðan er í løtuni ikki broytt, men sjálvandi havi eg umhugsað møguleikan at byrja aftur, sigur Tróndur Vatnhamar.

Tróndur spældi í fjør fyri B36, har hann eisini hevur sín uppruna. Seinnu hálvu av árinum í fjør vardi Jóan Pauli Dahl Jakobsen málið hjá B36, og nú verður tað altso Meinhardt Joensen, ið skal standa millum stólparnar.



Hóast talan var um dóm, sum skelkaði stolta felagið í Klaksvík, eru greiðar ábendingar um, at KÍ sjálvt megnar at gjalda Tony Paris hálva millión krónur í endurgjaldi

Mynd: Álvur Haraldsen

# 2009 bjargaði KÍ

**Ítróttarliga endaði tað við niðurflyting. Men fíggjarliga eydnaðist at endurreisa KÍ. Enntá somikið væl, at felagið eftir øllum at døma kann rinda Tony Paris pengar við kassa eitt**




Jákup Mørk

KÍ hevur eina loysn upp á málið um endurgjald til Tony Paris. Tað vóru boðini, sum komu úr Klaksvík í farnu viku, har tey seinastu vikurnar hava mett um og vigað dómin, sum felagið fekk í sakarmálinum frá fyrrverandi venjaranum.

Seinnapartin í dag skuldi KÍ taka endaliga støðu til, um dómurin verður góðtikin ella kærdur, og tað er alt, sum bendir á, at dómurin verður góðtikin.

### Eiga pengar

Og hóast talan var um dóm, sum sendi stóran skelk ígjøgnum stolta felagið í Klaksvík, so eru greiðar ábendingar um, at KÍ faktiskt hevur ráð at gjalda venjaranum tað, sum hann nú krevur.

2009 var kanska lakasta árið í felagssøguni á tann hátt, at KÍ fyri fyrstu ferð nakran tíð flutti úr bestu mansdeildini.

Men alt hevur sínar orsøkir. Og í hesum førinum var orsøkin, at KÍ repaði seglini fíggjarliga. Felagið hvørki vildi ella hevði ráð til framhaldandi at vera partur av pengamylluni, sum hevur koyrt við fyrilitarleysari ferð seinnu kappingarárini. Og hóast felagið í summarsteðginum styrkti seg við fleiri spælarum, so er endaliga úrslitið helst eitt úrslit, sum er nakað langt omanfyri nulllið.

Eginognin í smápartafelagnum, sum hevur raksturin av besta mansliðnum um hendi, var við ársbyrjan negativ við nærum 700 túsund krónum, men hendan er nú endurreist við einum positivum rakstri.

Og eisini KÍ sjálvt hevði yvirskot, tó at hetta helst ikki var heilt so stórt sum hjá Sp/f KÍ.

Samanlagt ber hetta við sær,at KÍ í dag er hampuliga væl fyri fíggjarliga. Og hóast allar 503.000 krónurnar, sum Paris skal hava, ikki standa á bók, so er neyvan nakar trupulleiki hjá felagnum at læna hesar pengar í dag. Eisini hóast peningastovnarnir hava verið nakað trekari við útlánum nú, enn teir áður hava verið.